## Logos Hope lagt frá landi

Fyrrapartin í gjár legði stóra missiónsskipið “Logos Hope” frá landi í kroatiska havnabýnum Trogi.Her hevur skipið ligið til bryggju, samstundis sum ein rættiliga stór og umfatandi umbygging er framd umborð.Nú fer skipið til Týsklands, har seinasta hond skal leggjast á arbeiðið, áðrenn gamla Norröna kann brúkast til tað hon var ætlað til, nevniliga eitt flótandi trúboðaraskip. Umborð verða fleiri hølir til ráðstevnur eins og ein bókahandil, sum man teljast millum heimsins størstu. Tað er trúboðarafelagsskapurin Operation Mobilisation sum eigur Logos Hope. Fleiri føroyingar fara helst at verða við hesum skipinum í framtíðini. Til ber at fylgja við siglingini umvegis eitt vevmyndatól á heimasíðuni http://www.omships.org/webcam/



## Tónleikakafé í Føroyahúsinum

Í kvøld klokkan 20.00 skipar Kristnastova fyri tónleikakafé í Føroyahúsinum. Fleiri av teimum, ið javnan hava teirra gongd í Kristnastovu fara hetta kvøldið at geva eina avslappaða konsert við sangum, tey sjálvi hava gjørt og coverløgum. Ein nýggjur bólkur fer at framføra 5 sangir. Petur Háberg fer at framføra sangir hjá sær sjálvum. Jenny Old og Ólavur J. Hansen fara at framføra sangir, ið teimum dámar. Øll eru hjartaliga vælkomin at hugna sær í Føroyahúsinum hetta kvøldið. Meir er at frætta á www.kristnastova.dk

# Alt økið eigur at verða EIN kommuna

**Borgarstjórin í Klaksvík er sannførdur um, at Norðoyggjar høvdu verið sterkari sum ein einstøk kommuna. – Hetta hevði verið best fyri hetta økið, sigur Steinbjørn O. Jacobsen**

KOMMUNUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*




*Fleiri bygdir í Norðoyggjum eru longu lagdar saman við Klaksvík, og aðrar standa á gáttini til tað sama. Myndin vísir 1) tey økini sum longu er løgd saman, 2) tey sum fara at leggja saman, 3) tey økini sum umhugsa at leggja saman og 4) tey økini sum ikki enn hava tikið støðu í hesum máli*

*Myndgerð: sosialurin*

**Norðoyggjar:** Skal ein trúgva teimum útsøgnum sum eru komnar í seinastuni er nógv sum bendir á, at fleiri kommunur í økinum eru sinnaðar fyri størri samstarvi.

Íbúgvararnir í **Svínoy** vóru ikki í iva um at fara upp í Klaksvíkar kommunu. Við eina fólkaatkvøðu um spurningin, vóru nærum allir fyri eini samanlegging við Klaksvík.

Borgarstjórin á **Húsum**, Magni Garðalíð, er somuleiðis sinnaður fyri hesum. Við sjónvarpið segði hann í farnu viku, at tey ætla at tosa við Klaksvík um hetta.

Líktertilat klaksvíkingum dámar væl hetta útspælið, og er ætlanin at hava tann fyrsta fundin við tey longu í næstu viku.

### Fyri og ímóti

Hóast hetta arbeiðið er farið í gongd, eru fleiri av kommununum, sum ikki enn eru komnar so langt á hesi leiðini.

Borgarstjórin í **Hvannasundi**, Júst Poulsen, er sjálvur als ikki heitur fyri eini samanlegging, eru kortini samráðingar millum Hvannasund og Klaksvík um hetta málið beint nú.

Ein samráðingarnevnd arbeiðir í hesum døgum við spurninginum, og er ætlanin at finna ein leist, sum helst fer at miða eftir eini samanlegging í framtíðini.

– Eg haldi at samráðingarnar við fólkini úr Hvannasundi hava gingið sera væl, staðfestir borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen.

### Byrjaðu í Kalsoy

Steinbjørn O. Jacobsen er sjálvur sera heitur fyri øktum samstarvi í Norðoyggjum.

Tað byrjaði í hesum umfarinum við, at Mikladalur og Trøllanes komu upp í Klaksvíkar kommunu. Men aðrar kommunur standa næstar í røðini.

– Onkustaðni skal ein væl byrja, sigur borgarstjórin í Klaksvík.

Tað var bygdarráðið í Svínoy sum kom við ynskinum um samstarv og samanlegging við Klaksvík.

Svínoy er ein kommuna við lítlum fólkatali, men stórari vídd. Hinvegin ynskir oyggjarfólkið betri ferðasamband, tí framtíðin á oynni er treytað at góðum ferðasambandi til meginøkið.

Tann dagin, ið ferðasambandið verður í lagi so ella so, verða góðir møguleikar fyri eini framtíð í Svínoy.

Har er ein smoltstøð, sum ikki er virkin í løtuni, og kemur annað virksemi í bygdina, kemur lív í hana aftur.

## Fundur um læknaskipanina

Hóast Norðoyggjar ikki enn eru skipaðar sum ein einstøk kommuna, eru kommunurnar kortini felags um ávísar uppgávur. Millum hesar er tann týðandi kommunulæknaskipanin. Trupulleikin hevur bert verið hann, at klaksvíkingar hava goldið allar útreiðslurnar til rakstur, hóast skipanin er galdandi fyri alt økið. Týsdagin kallaði Steinbjørn O. Jacobsen umboð fyri allar kommunurnar inn til fund at tosa um hetta evnið. – Tað búgva eini 1000 fólk uttanfyri Klaksvík, og tí er tað eitt sindur órættvíst at hinar kommunurnar í økinum ikki gjalda til skipanina, sigur borgarstjórin. Arbeitt verður nú við eini loysn – einum sonevndum býtislykli – har hvør einstøk kommuna fer at gjalda til skipanina eftir fólkatalinum har. Staðfest varð á fundinum, at tað stendur ikki ov væl til við kommunulæknum í Norðoyggjum. Í løtuni er bara ein fastur lækni, meðan ein er noyddur at dúva uppá avloysarar, sum bæði hava íbúð, bil og skrivara. – Hetta er ein støða, sum kostar okkum nógv, staðfestir Steinbjørn O. Jacobsen.

**sb.**

# – Púra rætt, Christian

**Í blaðnum í gjár bar mikladalsmaðurin, Christian Andreasen, fram hugsanir sínar um, hvat rættast er at gera við samferðsluna til heimaoyggj sína**

TUNLAR
*Snorri Brend*

**Klaksvík:** Christian segði, at ístaðin fyri nýtt skip til Kalsoyarleiðina, átti ein at brúkt kostnaðin fyri hetta sum stovnsfæ til eitt felag, sum skuldi gera ein undirsjóvartunnil millum Borðoynna og Kalsoynna.

Eitt líknandi uppskot var uppá tal, tá Norðoyatunnilin var í umbúna. Men henda ætlanin gjørdist ikki veruleiki.

- Tað var harmiligt, at ein ikki fekk gjørt henda tunnilin til Kalsoynna beinanvegin, sigur Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu, sum eisini umfatar Mikladal á Kalsoynni.

Hann tekur fult undir við hugsanini hjá Christiani. Tí, sum hann sigur:

- Hetta hevði verið nógv lagaligari, og soleiðis kundu kalsoyingar havt fast samband hvønn einasta dag.

- Eg veit væl, at ein slíkur tunnil er ein stór íløga. Men í seinna enda krevur hann ikki eins nógv viðlíkahald sum ein ferja og ein ferjulega, staðfestir borgarstjórin.

Christian Andreasen legði fram hugsan sína í teirri staðbundnu Mikladalsnevndini undir Klaksvíkar kommunu. Ein áheitan varð send kommununi í september mánaði. Enn er hetta ikki vorðið eitt mál í býráðnum, men tað verður tað einaferð seinni.

- Tað er neyvan lætt at tosa um undirsjóvartunlar í dag. Hinvegin vil eg bara siga, at eg eri púra samdur við tí, sum Christian hevur borið fram, slær borgarstjórin í Klaksvík fast.